

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 04 - 06 - 2012

# Leggja orkuleiðing úr Íslandi til Bretlands

Nú bretski orkumálaráðharrin, Charles Hendry, hevur verið í Íslandi, hava hann og íslendski ídnaðarmálaráðharrin, Oddný G. Harðardóttir, skrivað undir ein sáttmála, sum millum annað umfatar ein 1.500 kilometrar langan kaðal úr Íslandi til Bretlands. Tað skrivar Ingeniøren. Sambært íslendska Morgunblaðnum skulu íslendingar senda geotermiska orku úr íslendsku undirgrundini til bretska elkervið, og gongst sum ætlað, verður leiðingin klár at taka í nýtslu í 2020. Fyri stuttum staðfestu altjóða granskarar, at tveir kilometrar niðri í jørðini er magma, sum ger damp, sum er meiri enn 400 stig heitur alla tríggjar ferðir heitari enn vanligir geotermiskir brunnar. Við sáttmálanum við íslendingar kunnu teir bretsku brúkararnir rokna við einum støðugum elprísi. Tað er kortini ikki greitt, hvat bretar skulu rinda fyri orkuna úr íslendsku undirgrundini. Charles Hendry hevur fyrr sagt, at kaðalsambandið við Ísland er avgerandi fyri eina trygga orkuveiting og fyri grøna orku, tí tá oljugoymslurnar í Norðsjónum fara at minka, noyðast bretar at innflyta meiri gass og olju, og so verður orkan dýrari. Bretland hevur sum er kaðalsamband við Niðurlond, Írland og Frakland, og tíggju kaðalar til Danmarkar og Noregs eru í gerð ella á tekniborðinum, skrivar Ingeniøren.